**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 4 |
| Tíð: | 07-04-2022 klokkan 13 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Katrin Holm, forkvinna, Bjørghild Djurhuus, næstforkvinna, Julianna Klett, kassameistari, Petur Rouch, skrivari, og Marin Rasmussen, limur.

**Fundarskrá:**

1. Tiltøk í Tilhaldinum
2. Eldradagurin 2022
3. Góðkenning av fundarfrágreiðing frá seinasta fundi
4. Ymiskt

<u>AD 1 Tiltøk í Tilhaldinum</u>

Fyrsta tiltakið hjá Eldraráðnum í Tilhaldinum verður 28. apríl 2022, har Marius Rein hugleiðir um Havnina fyrr. Tað næsta tiltakið verður um arvarætt.

<u>AD 2 Eldradagurin 2022</u>

Høvuðsevnið á Eldradegnum 2022 verður umhvørvið.

<u>AD 3 Góðkenning av fundarfrágreiðing frá seinasta fundi</u>

Fundarfrágreiðing 2022-3 varð góðkend.

<u>AD 4 Ymiskt</u>

Tá fundurin byrjaði, fingu vit vitjan av leiðaranum í Tilhaldinum, Eirikur Suna Danielsen. Vit fingu eitt langt prát um hansara ætlanir fyri komandi tíðina. Hann vildi gera Tilhaldið meira opið og fjølbroytt, og vit avtalaðu, at okkara tiltøk skuldu samskipast við hansara. Lýst verður við tiltøkum á nýggju heimasíðu Tilhaldsins og harumframt verður faldari gjørdur fyri hvønn mánaða. Vit umrøddu eisini hølisviðurskifti í Tilhaldinum, og Eirikur Suni skeyt upp, at vit skiftu skrivstovu til ovastu hædd. Vit hugdu at hølinum og tóku av tilboðnum. Vit skulu so rudda upp á gomlu skrivstovu okkara. Tilhaldið verður stongt frá 27. juni til 1. august, men verður opið á Ólavsøku.

Vit eiga at rykkja eftir fundarfrágreiðing frá fundinum við borgarstjóran 30. mars 2022. Á fundinum varð millum annað upplýst, at arbeiði við lyftini í Tilhaldinum fór í gongd í summar.

Skotið var upp at umhugsa at biðja um fund við mentamálaráðharran, har málið um útbugving av røktarfólkum var á skránni.

Næsti fundur er settur at vera 5. mai klokkan 12:30, har vit byrja við einum kaffimunni í stóra salinum.

Skrivað tann 12. apríl 2022.

Petur Rouch,
skrivari